# Jólarómin

Tað er eingin loyna at nógvur rómi verður brúktur um jólini. Hetta merkir mann eisini á Mjólkavirkinum har tey, í vikuni uppundir jólaaftan, koyra uml. 60.000 pakkar av róma út um landið. Mjólkin kemur mest sum allatíðina inn á virkið, sum jú ikki bara soleiðis kann leggja stilt. Tí verður eisini arbeitt í leygardagin og 23., Tollaksmessudag – og møguliga eisini 2. jóladag. Afturat teimum 60.000 pakkunum av róma verða eisini 20.000 pakkar av súrróma framleiddir og síðan koyrdir út til teir ymisku matvøruhandlarnar kring landið. Í jólavikuni seta tey eisini eykarutur inn, fleiri handlar hava jú opið inntil 22.00 sunnukvøldið. So desemburmánaðurin er ikki sum hinir, eisini tá ið tað kemur til róma.























